# Óvissan dregur

**Tað er onki ævintýrkent við at sita einsamøll í einum kjallara og mála. So eg skapi míni egnu ævintýr við mínum málningum og teknikkum, eg ongantíð havi roynt fyrr, sigur listakvinnan Maria Mørkøre, sum í løtuni hevur eina sera forvitnisliga framsýning í Kunningastovuni í Klaksvík**

LISTAFRAMSÝNING
*Anna V. Ellingsgaard*
*ave@post.olivant.fo*

Um tú fert at leita eftir einum ávísum listarligum stíli á framsýningini hjá Mariu, leitar tú til fánýtis. Teir 19 málningarnir eru ógvuliga ymiskir, bæði í myndevni og teknikki. Men tað er ikki tí, Maria er nøkur óroynd listakvinna. Hon hevur málað burturav í eini 8 ár nú, og hevur nógvar framsýningar á baki.

Tað er avgerðandi fyri meg ikki at læsa meg fasta í nakran ávísan stíl, tí vandin fyri at steðga upp listarliga er ov stórur, sigur Maria. Mær dámar í heila tiki ikki, at heimurin verður ov léttur at spáa um. Tað skal vera pláss fyri at leypa út í, har tú ikki ánar um tú grynnir.

## Royndir

Maria sigur, at allir hennara málningar skulu fatast sum royndir, heldur enn lidnir málningar sum so. Hon leitar allatíðina eftir onkrum nýggjum útrykki, helst onkrum, hon ikki hevur sæð á sama hátt áður.

Á hesi framsýningini hevur hon millum annað tríggjar málningar av sama myndevni og við sama heiti. Hesir máningarnir "Á Eiðinum" eru so ymiskir, at tað er ikki fyrr enn tú kagar í skránna fyri framsýningina at tú varnast, at teir eru av sama myndevni. Stílurin flytir seg frá beinum strikum og reinum litum yvir í tað meir tilvildarliga og óróliga.

Teir reinu málningarnir bera boð um eina trongd til at kunna stýra tingunum rundanum teg, haldi eg, sigur Maria. Vit halda okkum hava sama útsýni úr køksvindeyganum hvønn dag, men ljós og veður broyta tað frá eini løtu til aðra. Hvat tú sært, veldst um nær tú hyggur. At mála eitt ávíst útsýni er ivaleyst bara ein roynd at halda nøkrum fast.

Tað tekur langa tíð at mála teir reinum málningarnar. So tá eg eri liðug við ein av teimum, má eg sleppa at mála okkurt her og nú við fullari ferð. Sleppa takinum og lata litir og rørslir gera av, hvagar leiðin gongur.

## Á ferð í hugaheiminum

Myndevni hava ongantíð havt serliga stóran týdning fyri meg, sigur Maria. Tí havi eg ofta fleiri málningar av somu meir ella minni tilvildarligum uppstillingum, har eg eksperimenteri við ymsum teknikkum á sama myndevni. Á tann hátt kemur nýggja útrykkið heldur enn myndevni at spæla størsta leiklutin.

Eg máli heldur ikki fyri at eftirlíkna veruleikan, kanska heldur fyri at finna hann. Veruleikin broytist alt eftir, hvør sær hann og nær. Tí eru mínir málningar bara egnar tulkingar av tí, eg síggi og ikki av tí, onkur heldur, at eg átti at sæð. At mála er fyri meg ein ferð í hugaheiminum, sum ongan enda fær. Tað, sum í løtuni er mest áhugavert á hesi ferðini, er spenningurin millum tað trygga og óvissuna, millum tað náttúrukenda og tað meir mekaniska. Tað kemur ivaleyst nokk so týðiliga til sjóndar í málningunum av "Á Eiðinum".


Maria Mørkøre

## Prikkamyndir

Sum nakað nýtt roynir Maria seg hesuferð við einum teknikki, har hon nýtir smáar prikkar í staðin fyri penslastrok.

Vit liva fyri ein stóran part í einum visuellum heimi, har alt er sett saman av smáum prikkum. Eg havi vist altíð verið rættiliga hugtikin av tankanum um, at myndir og sjónvarpsmyndir í grundini bara eru smáir prikkar, settir saman á ein hátt, soleiðis at vit ikki longur varnast teir og bara síggja myndina, sigur Maria.

Tað er eitthvørt provokerandi við hesum málningunum. Prikkarnir eru nóg smáir til at skapa eina mynd, men ov stórir til at tú kanst lata sum, tú ikki sær teir. Tað er, sum myndirnar støðugt minna teg á, at onki er, sum tað sær út til at vera. Á ein hátt kennir tú teg snýttan, samstundis sum hesar myndirnar, meir ein nakrar aðrar fortelja tær øgiliga beinleiðis, hvussu tær eru gjørdar. Prikkarnir geva myndunum eina heilt serliga dýpd við einum science-fiction kendum dámi yvir sær, samstundis sum tað luftiga ljósspælið fær tankarnar at leita til aftur til teir eldru, fronsku impressionistarnar.

Hesar myndirnar eru eitt boð uppá, hvussu tað, vit síggja, í grundini er skrúvað saman, sigur Maria. Eg havi onki endaligt svar, og tað hevur neyvan nakar annar heldur. Onki er so dragandi sum óvissan. Hon gevur mær jú eisini møguleika at halda fram at mála í tað óendaliga.

## Einfalda strikan

Fyri at kunna mála mást tú fyrst duga at tekna. Maria hevur altíð teknað, og seinni fór hon á listaskúla í tvey ár, har hon legði seg eftir at fínpussa teknikkirnir.

Nógv er hent síðani tá, men hon vendir altíð aftur til ta einføldu tekningina. Á hesi framsýningini hevur hon tvær tekningar við "Prestvegur" og "Í Brekkuni", teknaðar við svartari kolstift, kámað út í gráar tónar, sum minna teg á, at uttan mun til úrslitið, er útgangsstøðið hjá einum listamálara altíð ein einføld strika.







# At ganda heimin

**– Ph.d. um tap og endurvinning í seinna partinum av ritverkinum hjá Williami Heinesen**
**Seinni partur**

**Kim Simonsen**



Herfyri gjørdist Bergur Hansen ph.d. við eini ritgerð um William Heinesen. Bergur Hansen, ið er kendur sum skribentur í føroyskum bløðum og tíðarritum og sum fyrilestrarhaldari í Útvarpinum og í ymiskum høpi við ráðstevnur í Danmark og í Føroyum. Hann hevur fyrr útgivið eina bók um Karsten Hoydal og náttúruyrkingar hansara. Í dómsnevndini sótu Anker Gemzøe, Bo Håkon Jørgensen og Erik A. Nielsen.

Í fyrra parti umrøddi eg viðurskifti til mytuna hjá William, sum Bergur tulkar mytuna, sum:

"*William Heinesen genopliver myten som et poetisk-symbolsk univers. De mytiske motiver som barndom, kristendom og færøsk folklore tolkes inden for rammerne af en moderne forståelseshorisont. Afhandlingen beskriver, hvordan Heinesen skaber en dynamisk helhedstolkning, der på én gang rummer myte og erfaring, fortid og nutid. Det erkendes, at der er et uophæveligt gab mellem disse verdener og at ingen naive koblinger og letkøbte slutninger således er mulige. Men Heinesen forsøger alligevel at få disse to verdener til at tale sammen.*"

Mytan er eisini vandamikil og mytisk list kann fáa okkum at endurupptaka primitiva hugsan og list, sum Ernest Cassier vísti á í bókini: "The Myth of the State", at nasisman endurtók eina dyrkan av kvæðum, heimatpathos, fólksligheit, Fafnerorminum hjá Wagner, minnilutakenslum, tonkum um jødar, rasuhugsan, klassisismu í arkitekturi og mytum í lívsheimspeki o.s.fr. Eftir annan heimsbardaga skrivaði Adorno um at eingin kann liva sum fyrr, at vit eru øll metafysiskt heimleys og dømd til fremmandagerðing, at sjálvt heimið er ein lygn. Kafka og Satré endurtóku hesa einsamøllu talu um einstaklingin, um hóptýning og ævigu útlegdina í einum syndraðum heimi. Samstundis skrivaði Hermann Broch, at óndskapurin og apokalypsan í 20 øld. júst hinvegin hevði endurføtt ein veg fyri mytuni. Her sigur Bergur:

"Metabevidstheden betyder, at den moderne tanke er i stand til at afdække mytens indre væsen. Men den betyder også, at forbindelsen mellem myten og den moderne tolkning ikke er uproblematisk. Myten kan med andre ord ikke tilegnes uden videre, for billedligt talt sidder Heinesens fortællere oppe i skrivetårnet afskåret fra de hellige kilder og værensmysteriet - det, Heinesen engang kaldte "livets forhexede slot". Fortællerne forsøger at overvinde spliddet ved at fortolke og fantasere om barndommens tabte land. Men efter at fortolkningen har fundet sted - dvs. helhedstolkningen - er der stadigvæk to vidt forskellige verdener - en oprindelig og en moderne. Hvor god fortolkningen end er, og hvor skøn litteraturen end er, kan disse ikke bortforklare forskelligheden. Med andre ord rejser genvindelsen af mytens tabte horisonter en række spørgsmål af hermeneutisk karakter. Spørgsmålene drejer sig om, hvordan fortolkningen kan overvinde den kulturelle afstand til myternes verden."


*Bergur Hansen: At genfortrylle verden. En hermeneutisk-fænomenologisk undersøgelse af tab og genvindelse i William Heinesens senprosa. Pd.d. afhandling Institut for Nordisk Filologi. Góðkend 19. marts 2004*

Mytan endurføddist í skaldsøguni í 20 øld. á "ground zero". Men brúkið av hesum mytunum er ikki ein pseudomyta sum hon hjá Hitler um rasureinleika t.d., men ein tilvitan um at hetta eru mytur, t.v.s. at henda mytan er partvíst ironisk í forhold til fyrimyndina, tí fyrimyndin er ikki aðrar mytur men aðrar søgur. Her kann høvundin gerðst idealistiskur og meta-poetiskur, so at tað er torført at menna ein nøkunlunda konsistentan persónligan form og poetik við mytuni sum fyrimynd.

Bergur tók til í sínum forsvari, at:

"*En mere eller mindre koldt objektiverende fornuft har spillet rollen som modernitetens øverstbefalende, og det er Ricoeurs pointe, at denne fornuft ikke er tilstrækkelig som forklaring af myten. For den rationelle tanke er myten uden nogen relevans for det moderne liv, mens Ricoeur tillægger hermeneutikken en evne til at lytte til myterne og finde nye betydninger i dem. Heller ikke hos Heinesen er der dækning for entydig aflivning af myten. Det erkendes, at myten har tabt sin umiddelbare forklaringskraft - sin ætiologiske funktion - men den tilskrives også en fortsat kerne af mystik, som ikke lader sig blotte. Heinesen indtænker således den kritiske distance i form af afmytologisering i sin generhvervelse af mytisk bevidsthed.*"

Tá tað kemur til mytuna sum ein søga millum aðrar kann brúkið av mytuni eisini í dag opna (tað hava vit sæð frá flower-power poesi til new age via mystik) fyri eini postmodernaðari kós, har øll narrativ bert fyrihalda seg til onnur narrativ. Konstruktivisman í hesum kann gerast vandin, og at alt tí kann relativiserast. Tað er eisini vandamikið at mytan skal brúkast sum ein brúgv millum traditiónir og modernaða list, ið er ein léttur máti at yvirkoma alt kjak innan avantgarduna i 19., 20. og 21. øld. Man kann ikki bert siga orðið "myta" og so eru vit væl fyri og bjargaði, tí vandin er m.a. at snorksovna í hesum.

Heinesen skrivaði mangan um ein upprunaheimin sum ein mistan heim. Um hetta sigur Bergur:

"*Med andre ord rejser genvindelsen af mytens tabte horisonter en række spørgsmål af hermeneutisk karakter. Spørgsmålene drejer sig om, hvordan fortolkningen kan overvinde den kulturelle afstand til myternes verden.*

*Spørgsmålene kan formuleres på mange måder. F.eks: hvordan kan mytisk fantasi, der for længst er usandsynliggjort, genvindes i en kunstnerisk form? Hvordan kan negative - dvs. brutalt afslørende og dementerende - kategorier som afmytologisering, forklaring og distance være en betingelse for noget positivt som en ny tilegnelse af myten? Hvordan kan moderne mytisk prosa åbne et lukket betydningsrum som barnet og myten? Er symbolets helhedstolkninger overhovedet mulige efter modernismen forstået som repræsentationens krise og kontingensens indtog?*"

Her eru nógvir áhugaverdir spurningar, ið Bergur av góðum grundum ikki fær svarað og kundi hann tað, so skuldi hann fingið Nobelprísin. Kreppan í representatiónini ella umboðanini, sum vit eru noydd at kalla hetta, tí vit hava so fá orð innan bókmentafrøðina, er eina partur av modernaðari list, eisini tí argastu postmodernismuni og minemalismuni. Ofta er tað sum um Bergur er so glaður fyri hermeneutik og heildum, at hann vil gera alt og øll til heildarhugsandi hermeneutikarar, serligani William:

'"Fremstillingen af erindringen viser, at Heinesen, just som hermeneutikken, tager det meningssøgende individ og livets store dramaer alvorligt. Min beskrivelse af tabet handler derfor ikke blot om myten som en æstetisk konflikt, men også om eksistentielle og almenkulturelle aspekter i denne konflikt (…) men også til Heinesens dybt humanistisk-hermeneutiske forhold til det menneskelige aspekt. Det fundamentalt menneskelige finder navnlig sit udtryk i skildringer af tabet af barndommen. Erindringen om barndommen er hos Heinesen et hårdt prøvet og problematiseret perspektiv. Der findes som sagt ingen nemme koblinger mellem barndommens dengang og det skrivende og erindrende nu.".

Fokusið hjá Bergi, og øllum hermeneutikarum, serligani teim Aage Henriksen ávirkaðu, er at innskriva eina rúgvu av lívsfilsofi, t.v.s. alla lívsfilosofi, ið peikar móti tí forsonandi og ikki modernistiska spjaðan (Satré t.d.). Gjørligt er at kjakast um tilognan ella endurvinningin er positiv ella um hesin William ikki er ein sperdur høvundi, ið hevur eina nógv meiri tragiska og pathoskenda rødd enn Bergur ger hann til, hetta var ein atfinning frá Bo Hakon Jørgensen. Eitt annað er at seinverkið, eg kann nevna " Tårnet ved verdens ende" og "Laterna Magica" hjá William er fylt við generøsum melankoli og ikki einari positivari endurvinning av øllum negativum. Her er ein veldigur diskontinuitetur millum lívsfyllu og melankoli, Bergur meinar, at her er ein diskontinuitetur, men at henda kensla javnvigar við kensluna av kontinuiteti. Sum eg síggi William Heinesen, so var hann á ein hátt ein mótviljaður modernistur. Eg haldi ikki, at man kan siga, at diskontinuitetur javnvigar vid nakað, serligani ikki við kontinuitet, slíkt er ikki semantiskt ella logiskt, man kann kanska siga, at formurin var merktur av diskontinuteti (modernismu) men innihaldsligi kjølurin var ein roynd at fanga tað mista, tað sum er farið. Soleiðis at Heinesen var ein modernistur í kreppu og kreppan var sjálv modernismutilvitanin.

## Modernaða skaldsøgan

Í 20. øld. komu høvundar sum Marcel Proust, Franz Kafka, Thomas Mann og James Joyce at menna eitt nýtt slag av skaldsøgum, ið skapti nýggj viðurskifti millum søgulig evni og sjálvan formin. Nú var tað ikki longur dekningur fyri sálarligum og politiskum evnum, tí hin symbolski formurin, ið skaldsøgan bygdi á frá 19. øld. var við eitt avoldaður. Henda skaldsøgan frá 19. øld. var eykend av einum alvitandi frásøgurødd, einari stórari søgu og einum samanhangi millum tíðina í skaldsøguni og persónarnar. Menningarskaldsøgan og søguliga skaldsøgan vóru við eitt avloyst av avantgardistiskum formum, ið settu álvarsom spurnartekin við formin í skaldsøguni. Ein strategi og ein roynd at yvirkoma hetta er at bruka mytuna. Kent er at T.S. Elliot helt at mytan: " gjorde den moderne formløses og fragmenterede verden tilgængelig for litterær behandling". Danski høvundin Peer Hultberg tók til um skaldsøguna, at við Joyce sóu vit at mytan var redusera til nærum einki, sjálvur helt hann, at vit liva mytiskt og at vit liva mytologisk lív. Her er mytan ein loysn uppá fremmandagerðing og spjaðing, júst sum Bergur finnur eina tulking av nærum øllum ritverkinum hjá Heinesen via Riceour og mytutilvitanina.

Eg haldi at hetta er ein ritgerð, ið eingin sum ætlar sær at lesa um William Heinesen kemur uttan um. Her er William settur inn í ein modernaðan ástøðiligan og áhugaverdan kontekst. Hetta er helst tann mest ástøðistilvitaða ritgerðin, ið ein føroyingur hevur skrivað innan bókmentafrøði enn. Tillukku við hesi stóru ritgerð. Vónandi kemur henda ritgerð út sum skjótast sum ein stór og flott bók.